# ítróttur

Nr. 203 • leygardagur • 21. oktober 2000 • 74. árgangur • www.sosialurin.fo


# Eingi boð frá HSF



*StÍF kundi ikki spæla heimadystin seinasta vikuskiftið, tá eingir dómarar vóru møttir. Eftir øllum at døma er talan um ein stóran bukk á HSF-skrivstovuni, haðani boðini um dystin ongan tíð tykjast vera farin til hvørki felag ella dómarar*

*tilvildarliga vald savnsmynd*

**Tað tykist meira greitt, at orsøkin til vantandi dómararnir á Skála sunnudagin var, at eingi boð vóru komin av HSF-skrivstovuni. Hvørki til dómararnar ella til feløgini**

HONDBÓLTS-DÓMARAR

*Jákup Mørk*

Tað er ikki sørt, at tað skapti nakað av røringi í, tá vit í týsdagsútgávuni umrøddu hendingina á Skála, har eingin dómari møtti til dystin millum kvinnuliðini hjá StÍF og Søljuni.

Í greinini skrivaðu vit, at eitt teldubræv vanliga verður sent bæði dómarum og feløgum, men at tað síðani eru feløgini, sum endaliga boða dómarunum frá, hvussu dystirnir verða avgreiddir.

Trupulleikin sunnudagin tykist eftir øllum at døma at vera tann, at umrødda teldubrævið ongan tíð er komið fram til røttu móttakararnar. Formaðurin hjá StÍF, Andrass Danielsen, er sum so ógvuliga fáorðaður um hendingina, men millum reglurnar í tí, sum sagt verður, tykist tað standa heilt greitt, at tað so ikki er StÍF, sum skal lastast fyri hendingina.

- Tað er einki uppbyggjandi fyri hondbóltin at fara út í fjølmiðlarnar at viðgera eitt mistak, sum hent er. Og tað ætli eg mær heldur ikki.

- Men tá sagt verður, at hjá StÍF skuldi onkur klokka ringt, so er tað rætt – Og hon ringdi eisini longu fyrstu ferð áttaníggju dagar undan hasum dystinnum. Longu tá varð tosað fyrstu ferð við rætta viðkomandi um hetta teldubrævið, sum ikki kemur.

- Annað ætli eg mær ikki at siga um hetta mál, sigur StÍF formaðurin at enda.

## Dómarar vistu einki

Sostatt tykist formaðurin hjá StÍF at siga meira ella minni beinleiðis, at ábyrgdin fyri mistakið skal finnast hjá Hondbóltssambandinum, og tað er so á ongan hátt nakað, sum verður avvíst av TB, har teir báðir dómararnir eru heimahoyrandi.

Haðani eru boðini, at einki teldubræv við dómaraásetingum er komið. Hvørki til felagið ella til dómararnar sjálvar. Sendi telduposturin úr Hondbóltssambandinum sýnir annars, at ein av móttakarunum er makin hjá øðrum av dómarunum, men sambært TB er her talan um eina adressu, sum fyri langari tíð síðani er strikað. Nakað sum HSF eisini hevur fingið boð um fyri langari tíð síðani, verður sagt.

## Má ikki henda

Eftir stendur so kappingarnevndin hjá HSF, sum eftir øllum at døma eigur svartaper í hesum spælinum. Og á pappírinum er tað eisini staðfest, at tað í øllum førum eru tey, sum standa við ábyrgdini fyri, at dómarar, tíðtakarar og skrivarar eru til einstøku dystirnar.

Og soleiðis sum málið tykist liggja nú, so er einki at ivast í, at tað eisini er HSF, sum hevur ábyrgdina av, at boðini til dómararnar og heimaliðið ikki komu fram í førinum, sum viðvíkur dystinum millum StÍF og Søljuna. Og hvat verri er, so tykist tað eisini so, at hetta ikki er fyrstu ferð, at slíkt mistak hendir, og tað enntá aftaná, at felag hevur gjørt vart við hetta.

Hvussu er og ikki, so munnu flestu hondbóltsáskoðarar kring landið standa spyrjandi eftir hendingina á Skála, har tvey lið møta til dyst, sum kortini ikki kann spælast. Og tað kann so undir ongum umstøðum góðtakast, at slíkt skal kunna koma fyri í fremstu hondbóltsdeildini.

Eftir er so bert at vóna, at hetta fer at viðvirka til, at líknandi tilburðir kunnu endurtakast framyvir. Og annars mugu StÍF og Søljan finna eina nýggja dystaráseting sínamillum.



# NØVN Í VIKUNI


Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo


Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Egga Jensen 60 ár



Í dag, hósdagin 22. januar, verður Jógvan Jensen í Havn 60 ár. Hann hevur altíð verið nevndur Egga, og tað er navnið, sum hann er kendur undir. Ikki minst í ítróttarheiminum, har hann síðani á heilt ungum árum og framvegis hevur sett og setir spor eftir seg.

Egga er havnarmaður. Hann er sonur Ansgar Jensen, sum var ættaður úr Sumba, og sum í nógv ár var koyrilærari í høvuðsstaðnum, og Annu, fødd Rasmussen og ættað av Sandi.

Egga leyk lærarapróg á Føroya Læraraskúla í 1969, og tað næsta árið var hann á Danmarks Højskole for Legemsøvelser, har hann eisini var skúlaárið 1990–91.

Lívsstarvið sum lærari fór Egga undir í 1970. Fram til 1978 var hann lærari í Sankta Frans skúla, samstundis sum hann fimm tey fyrstu árini hevði tímar á Føroya Fólkaháskúla og eisini var koyrilærari. Hann hevði eisini tímar á Læraraskúlanum, har hann seinnapartin av sjeyti árunum varð settur í fast starv.

Í 1977–78 var Egga á árskeiði á Fróðskaparsetri Føroya, og síðani hevur hann luttikið í ymsum eftirútbúgvingarskeiðum.

Egga var í mong ár aktivur ítróttarmaður, og síðani hann gavst sum aktivur á hægsta støði, hevur hann verið virkin á so mongum øðrum økjum í ítróttinum. Hann kom á 1. lið hjá HB í 1960, og í næstan tvey ára tíggju var hann – undantikið tá ið hann var burturstaddur – á besta HB liðnum, har hann sum miðvallarspælari var við til at vinna eina røð av meistaraskapum og finalum í steypakappingini. Egga var fyrstu ferð á landsliðnum ímóti Íslandi B í 1964, og í alt spældi hann átta ferðir á fótbóltslandsliðnum. Hetta var frammanundan, at Føroyar í 1988 vunnu limaskap í altjóða fótbóltssamtakinum, FIFA. Dystirnir vóru ímóti Hetlandi, Orknoyum og Íslandi.

Egga var aktivur í fleiri øðrum ítróttargreinum í fremstu røð. Hann spældi hondbólt við Neistanum, flogbólt við NFL og HB, fimleik og í 1966 varð hann føroyameistari í einmansleiki í borðtennis.

1976–1981 var Egga venjari hjá unglingalandsliðum í fótbólti, og longu tíðliga í seksti árunum tók hann á seg at vera dómari bæði í hondbólti og fótbólti. Egga helt fram sum dómari í fótbólti, inntil hann fall fyri aldursmarkinum. Bæði fyri og eftir ta tíð hevur hann undirvíst nýggjum dómarum, hann hevur verið dómaraeygleiðari, og hann hevur nógvu tey seinastu árini verið instruktørur og staðið fyri dómarapróvdømingini.

Egga var í 1980 við til at seta Ítróttarsambandið fyri brekað á stovn. Hann hevur verið formaður har í mong ár.

Egga er giftur við Jónu Højgaard fødd Ellefsen úr Miðvági. Hon er dóttur Sofíu fødd Højgaard úr Rituvík og Joen Elias Ellefsen úr Miðvági. Jóna lærdi fyrst til sjúkrasystur og arbeiddi í fleiri ár á føðideildini. Síðani var hon í Danmark og lærdi til ljósmóður, og nú er hon ljósmóður á Landssjúkrahúsinum.

Jóna og Egga eiga tvey børn. Eyðfinn og Ann, sum bæði eru lærarlærd.

### Dagurin

**22. januar. Vincentius,** deyður umleið ár 300 í Zaragoza í Spaniu. Píndur til deyða undir Diocletianus keisara.

Navnið er latínskt og merkir *hin sigursæli.*

## Andreas Djurhuus 95



Hósdagin 22. januar verður Andreas Djurhuus, vanliga nevndur Diurin, úr Porkeri, 95 ár. Andreas er føddur í Porkeri, sonur Olavus úr Skemmuni og Elsebeth Susanne Djurhuus av Nesi í Porkeri.

Sum ungur fór hann sum aðrir føroyingar til skips. Tey fyrstu fimm árini við deyðsiglara. Av teimum monnunum eru ikki mangir eftir á lívi í dag.

Eftir hetta yvirtók hann virksemið hjá pápanum, sum var handil og fiskakeyp.

Í 1938 giftist Andreas við Ragnhild Nicodemussen úr Skálavík. Fyrstu árini búðu tey í Porkeri og fluttu so til Vágs, har hann rak handil og hevði skip, eisini hevði hann fitt av jørð, so nógv var at takast við hjá teimum báðum.

Ragnhild og Andreas fingu fýra døtur: Ina, sum býr í Havn, Oddvør, sum býr í Klaksvík, Brynhild, sum býr Danmark, og Jóna, sum býr í Trongisvági.

Í 1970 fluttu tey til Havnar, har tey bygdu sær snotulig sethús við urtagarði, sum er væl røktur líka til hendan dag.

Andreas arbeiddi nøkur ár í Skipshandlinum og síðan fór hann at starvast hjá Telefonverki Føroya, har hann arbeiddi, til hann var 78 ára gamal.

Í mars 2001 doyði Ragnhild, og síðan tá hevur Andreas verið einsamallur í húsi. Hann er raskur og gongur ella koyrir bil í Havnargøtum.

Andreas er ein av teimum stillu og friðarligu í samfelagnum, hann setti sítt álit á Harran sum sínum persónliga frelsara á ungum døgum, og hendan sterka trúgv hansara hevur borið hann gjøgnum lívið.

Føðingardagin er Andreas hjá dóttrini, Brynhild Djurhuus, Vølundsvej 1, DK-3650 Ølstykke, Danmark.

Telefon 0045 47100296.




**Tøkk!**

Eg vil fegin takka øllum tykkum, sum tóku ímóti mær, tá ið eg kom heim úr Íslandi.

Tøkk fyri allar blómurnar og allar gávurnar.

Tað vermdi mítt hjarta at tit vóru møtt so fjøldment.

Tøkk til familju mína fyri altíð at standa við mína lið

Ein serlig tøkk til Gøtu Kommunu og Kaupthing

Heitastu og bestu heilsannir frá

**Eivør**

Sosialurin 341800